### Kalt grannalag

Viðurskiftini ímillum grannarnar Ukraina og Russland hava ongantíð verið so køld sum nú, og summir eygleiðarar lýsa tey sum eitt nýtt kalt kríggj. Meiningakanningar í Ukraina hava víst, at meiri enn 40 prosent av fólkinum hava ikki álit á Russlandi, og kanningar í Russlandi vísa á leið sama úrslit, skrivar Aftenposten.

Í Ukraina halda mong, at Russland ger seg inn á landsins fullveldi, tí russar hava ilt við at góðtaka, at Ukraina hevur valt at flyta seg nærri Vesturevropa heldur enn Russlandi. Gamla ukrainska stýrið hevði sera gott samband við Moskva, meðan stýrið hjá Viktor Jusjtskenko, forseta hevur valt at reka ein sjálvsstøðugan uttanríkispolitikk. Tí kenna nógvir russar tað, sum at Ukraina hevur vent teimum bakið.

Á nýggjárinum stongdi Russland gassveitingina til Ukraina, sum svaraði aftur við at krevja meiri leigu fyri russisku herflotastøðirnar við Svartahavið, og tað fekk øði í russisku leiðsluna, skrivar Aftenposten. Tað bøtti ikki um hýrin í Kreml, at Ukraina samstundis ognartók fleiri vitar fram við Svartahavinum, og nú hava russar svarað aftur við at steðga øllum kjøtinnflutningi úr Ukraina.

- Ukraina og Russland er farin undir eitt kalt kríggj, skrivaði ukrainska tíðarritið Korrespondent í síðstu viku.

### Krevja Thaksin frá

Umleið 50.000 fólk gingu sunnudagin kravgongu í teilendska høvuðsstaðnum Bangkok, har tey kravdu, at Thaksin Shinawatra, forsætisráðharri, skal leggja frá sær. Hetta var onnur kravgongan í eina viku, og fyrireikararnir hava boðað frá einari afturat tann 26. februar.

Thaksin Shinawatra varð afturvaldur til forsætisráðharra við stórum meiriluta fyri einum ári síðani, men nú er vent í holuni. Fólk eru sera misnøgd við, at stjórnin megnar ikki at forða áhaldandi ófriði har suðuri í landinum, men tann størsta misnøgdin kemst av, at forsætisráðharrin og skyldfólk hansara hava fingið nógvar pengar burtur úr at selja eina stóra fyritøku av landinum. Sambært fjølmiðlunum fingu forsætisráðharrin og skyldfólk hansara einar 11,3 milliardir krónur burtur úr søluni, og so var pengingurin skattafríur.

Sjálvure hevur Thaksin Shinawatra sagt, at hann fer ikki at leggja frá sær, uttan so at kongur biður hann fara frá, og tað er ikki serliga hugsandi, skrivar Reuters úr Bangkok.

### Færri ung festa sær í

Ein norsk kanning vísir, at altsamt færri ungfólk roykja. Bara fimm prosent av teimum 13 til 15 ára gomlu í Noregi roykja hvønn dag, og tað er helvtina færri enn fyri bara fimm árum síðani. Hagtølini siga eisini, at talið á ungum, sum roykja, hevur ikki verið so lítið síðani 1975, tá tann fyrsta kanningin bleiv gjørd.

Stjórin í norska heilsustýrinum, Bjørn-Inge Larsen, sigur, at tað hevur gingið betur í Noregi enn aðrastaðni at fáa tey ungu at venda sigarettunum bakið, og hann ivast ikki í, at tað eru áhaldandi upplýsingartiltøk, sum hava givið úrslit. Í fleiri ár vístu tølini, at norskir ungdómar royktu verri enn teirra javnaldrar teimum flestu londunum í Evropa, men soleiðis er ikki longur. Tey ungu hava snøgt sagt vent nikotininum bakið, sigur stjórin í heilsustýrinum.

Gongin ímillum tey ungu merkir eisini, at talið á roykjarum minkar sum heild. Vanliga verður sagt, at fólk, sum ikki eru byrjað at roykja, tá tey eru vorðin 20, sleppa undan pláguni. Í dag eru tað bara sjey prosent av teimum 20 ára gomlu í Noregi, sum roykja, og talið fer helst at minka.

### Svangir hávar

Sunnudagin gjørdu myndugleikarnir í landnyrðingspartinum av Avstralia av at steingja fleiri væl umtóktar strendur, eftir at menn hava sæð nógvan háv stutt úr landi.

Myndugleikarnir siga, at menn hava talt minst hundrað hávar, sum eru komnir inn ímóti landi at leita eftir føði. Tí kann tað vera vandamikið hjá fólki at svimja har, og tí eru fleiri strendur nú stongdar.

Í síðsta mánað doyði ein 21 ára gomul avstralsk kvinna, eftir at tríggir hávar høvdu lopið á hana.

## UTTAN ÚR HEIMI

# Bretar í øðini um Irak-myndir

**Myndir, sum vísa bretskar hermenn buka ungar irakar hava fingið øði í bretska almenningin og politikararnar. Tony Blair, forsætisráðharri, hevur lovað, at málið verður kannað til botns.**

BRETLAND
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Verjumálaráðið í London hevur longu sett fólk at kanna myndirnar, sum blaðið News of the World prentaði sunnudagin, og Tony Blair, forsætisráðharri, hevur lovað, at teir seku hermenninir verða revsaðir.

Myndirnar eru ótespilligar. Tær vísa bretskar hermenn taka fýra ungar irakar við sær inn á økið hjá bretska herinum tætt við býin Basra í Suðurirak. So leggja hermenninir á teir ungu irakarnar, sum verða slidnir, sparkaðir og tveittir aftur og fram. Ein av hermonnunum tekur alt upp á sjónband og eggjar feløgum sínum til at geva irakunum ein umgang.

-Ja, nú skulu tit fáa tað. Tit hava verið óskikkiligir dreingir, rópar hermaðurin við filmstólinum. Sjálvur sigur hann við News of the World, at hann tók hendingina upp á sjónband til stuttleika.

BBC hevur eisini víst nakrar av myndunum, og har siga tey, at tilburðurin vardi umleið ein minutt, og at teir ungu irakarnir vórðu slignir 42 ferðir hesa løtuna.

News of the World vil ikki siga, hvaðani blaðið hevur fingið upptøkuna, men blaðið hevur fingið at vita, at myndirnar eru tiknar í 2004. Blaðið hevur víst fleiri heryvirmonnum myndirnar, og teir hava váttað, at tær eru veruligar. Tað eru kortini tey, sum ivast, tí tá blaðið Daily Mirror kunngjørdi líknandi myndir fyri tveimum árum síðani, vísti tað seg, at tær vóru falsaðar.

Men leiðslan í News of the World sigur, at hon hevur kannað málið so gjølla, at hon er ikki í iva um, at hesar myndirnar eru veruligar. Stuart Kuttner, blaðstjóri, sigur, at blaðið hevur eisini fingið at vita, at bretskir hermenn í Evropa hava stuttleikað sær við myndunum leingi.

Í fjør vórðu tríggir bretskir hermenn dømdir í fongsul fyri at hava bukað fangar í einari fangalegu í Irak.

Í løtuni eru 8.000 bretskir hermenn í Irak, og síðani kríggið har byrjaði, hava 80.000 bretskir hermenn gjørt tænastu í Irak.



GRABBED: Rioters are brought back in



SOLDIER'S VICIOUS FILM VOICEOVER: 'Oh yes, oh yes, you're gonna get it. Naughty little boys. You little f***ers, you little f***. DIE'



*Tær skelkandi myndirnar úr Irak fara at herða trýstið á Tony Blair, forsætisráðharra um at taka hermenninar úr Irak.*

# Hamas býður Ísrael frið

**Hamas er til reiðar at viðurkenna Ísrael, men ikki beinanvegin.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

-Er Ísrael sinnað at viðurkenna okkara rættindi og at taka seg aftur úr teimum hersettu økjunum, fara Hamas og palestinska fólkið at gevast við vápnaða stríðnum.

Tað sigur leiðarin í Hamas, Khaled Meshaal, í samrøðu við russiska blaðið Nezavisimaya Gazeta. Orðini eru tekin um, at Hamas leggur á annan bógv, eftir at felagsskapurin vann palestinska tjóðartingsvalið tann 25. januar og nú fyrireikar seg til at skipa stjórn.

Síðani valið hevur felagsskapurin verið fyri stórum úr umheiminum, sum vil hava Hamas at leggja vápnini og at viðurkenna ísraelska ríkið. Ísraelska stjórnin hevur kunngjørt, at hon fer ikki at tingast við nakra palestinska stjórn, sum Hamas hevur ávirkan á, og í Washington verður sagt, at USA fer ikki at stuðla upp undir palestinskt sjálvræði, fyrr enn Hamas leggur vápnini og viðurkennir Ísrael.

Í síðstu viku frættist, at russiski forsetin, Vladimir Putin, hevði boðið umboðum fyri Hamas til Moskva at viðgera politisku støðuna. Innbjóðingin elvdi til vreiði í Ísrael, og USA var heldur ikki serliga fegið um hana. Talsmaðurin hjá George W. Bush, forseta segði tó seinni, at USA góðtekur, at Russland ger eina roynd at fáa Hamas at binda frið.

USA og ES meta Hamas sum ein yvirgangsfelagsskap, men tað ger Russland ikki.